gult2 cyan2 magenta2 svart2






gult3 cyan3 magenta3 svart3



# Slakar 700.000 krónur til føroyska mentan

**Fýra føroyskar verkætlanir hava fingið stuðul frá Norðurlendska Mentanargrunninum**

MENTAN

*Turið Kjølbro*

Á fundi í Norðurlendska Mentanargrunninum mánadagin í Umeå, vórðu 11,6 mió. krónur játtaðar til norðurlendska mentan. Játtanin er lutað til 112 verkætlanir í Norðurlondum og í útlondum. Ikki færri enn 340 umsóknir komu inn til eitt virði av 68 mió. danskar krónur.

Føroysku verkætlanirnar, sum fáa stuðul, eru fýra í tali. Sjónleikarbólkurin Gríma fær 200.000 krónur til at framføra verkið Macbeth í Føroyum. Tikið stig til framførsluna hevur Hans Tórgarð, sjónleikari. Leikararnir koma úr Noregi, Svøríki, Finnlandi og Føroyum.


*Myndatekstur: Hans Tórgarð, sjónleikari í Grímu, hevur tikið stig til at framføra leikin Macbeth í Føroyum*

- Hetta eru leikarar, eg havi gingið í flokki saman við í Finnlandi, sigur Hans Tórgarð.

Venjingarnar byrja í summar og sýningarnar vera í februar næsta ár, fyrsta á Gamla Meiarínum og síðani fer leikurin út at ferðast. Leikstjórin verður helst Cezarijus Grauzinis úr Litava.

Umframt henda forkunnuga leikin, fær Føroyska listastevnan, sum verður fyriskipað á fyrsta sinni í ár, 250.00 krónur. Nógv sera forkunnugt verður á skránni. Eitt nú Palle Mikkelborg, sum vann tónleikavirðislønina hjá Norðurlandaráðnum í ár, Usenkev framførir Don Juan fra Tranehuset um lívið hjá Williami Heinesen, Rasmus Lyberth úr Grønlandi syngur og spælir, og annað mangt.

Symposium um føroyska listamannin Mikines fær 90.000 krónur. Stevnan verður í sambandi við ársfundin hjá Nordisk Kunstnerforbund, sum verður hildin í heimbygd Mikinesar Mykines.

Norðurlendska sjónleikaraskeiðið fyri ung, sum fer at savna hálvt hundrað ungfólk í aldrinum 16 til 25 ár úr norðurlondum, umframt Føroyum, Grønlandi og Álandi fær 150.000 krónur. Í tíggju dagar fara professiónell at undirvísa í sjónleiki. Tað er Forbundet for Arbeidernes Teaterscener, sum skipar fyri.

Seinastu tíggju árini er talið á umsóknum til Norðurlendska Mentanargrunnin økt. Økingin í nítiárunum hevur verið 50 prosent meðan játtaðar umsóknir eru øktar við 25 prosentum. Í fjør komu umsóknir til grunnin til eitt virði av 160 mió. donskum krónum. Árliga fíggjarætlanin hjá grunninum er 26 mió. krónur. Føroyska umboðið í Norðurlendska Mentanargrunninum er Jóannes Dalsgaard, deildarstjóri í Mentamálastýrinum.

# Sinnislíðandi enn við skerdan lut

**- Ístaðin fyri at spara á psykiatrisku deildunum á Landssjúkrahúsinum, eigur játtanin at verða økt. Fíggjarstøðan í Føroyum er nógv broytt síðani byrjað varð at lata deildir aftur, sigur Svenning av Lofti, formaður í Sinnisbata**

SINNISBATI

*Turið Kjølbro*



*- Ístaðin fyri at spara innan psykiatriska økið, átti meiri peningur av verðið játtaður. Eitt nú tørvar psykiatrisku deildunum á Landssjúkrahúsunum stórar ábøtir, sigur Svenning av Lofti*

Sinnislíðandi eru framvegis við skerdan lut, tá ið tað snýr sum deildir, ið verða latnar aftur á Landssjúkrahúsinum. Í kreppuárunum vórðu psykiatrisku deildirnar stongdar ávís tíðarskeið á árinum fyri at spara pengar. Felagið Sinnisbati, sum arbeiðir til frama fyri at bøta um korini hjá teim sinnisbrekaðu í Føroyum, heldur, at tíðin er farin frá hesum afturlatingunum.

- Hetta hevur verið søga, sum hevur endurtikið seg í fleiri ár vegna sparingar. Men hóast vit hava mótmælt hesi steingjan, verður hetta framvegis gjørt, eisini í summar, tá ið deildir hava verið og verða stongdar hóast fíggjarstøða Føroya er púrasta broytt frá tí, at stongjan av heilum deildum byrjaði fyrst í nítiárunum. Psykiatriska økið er frammanundan illa fyri. Ístaðin fyri at spara á hesum øki, átti meiri peningur at verðið játtaður, tí tilboðini til psykisk sjúk eru ógvuliga avmarkað. Eitt nú átti ein reglulig samtaluterapi staðið øllum sjúklingum í boði. Hetta er rættiliga vanligt í grannalondum okkara., sigur Svenning av Lofti, formaður í Sinnisbata í formansfrágreiðing síni.

Í álitinum um bústaðartørv hjá teim sálarsjúku, sum varð handað landsstýrismanninum í almanna- og heilsumálum í vár, sigur Sinnisbati, at psykiatriska deild má fáa størri fíggjarjáttan, soleiðis at heilar deildir ikki framhaldandi verða stongdar fleiri ferðir um árið sum tað hevur verið gjørt. Hetta er ikki virðiligt fyri sjúklingar, er ørkymlandi og darvandi fyri viðgerðina, verður sagt.

# Trý verk í nótum

**Bjarni Restorff, tónasmiður, hevur givið út trý nótahefti**

MENTAN

*Turið Kjølbro*

Bjarni Restorff, tónasmiður og kórleiðari, hevur á egnum forlag givið út trý nótahefti. Talan er um nótarnar til yrkingarnar Regn og Orðini eftir Róa Patursson fyri blandað kór og capella. Umframt hevur hann givið út latínskan sálm. Í fororðunum skrivar Bjarni Restorff, at fyri gott og væl tveimum árum síðani heitti Oddvør Johansen, sum er organistur í Havnar Kirkju, á seg um at skriva eitt musikkstykki til kirkjuna. Fremst í huganum hjá Oddvør lá allarhelst ólavsøkan. Bjarni fór at leita í gomlum tilfari frá miðøldini, millum annað í sanginum "LUX ILLUXIT LAETABUNDA", sum sigst vera frá hond Ólavs Hins Heilaga. Men hesin teksturin var alt ov langur, og neumurnar høvdu ikki teir musikalsku eginleikar, sum hann leitaði eftir. Eginleikarnar fann hann hinvegin í latínska sálminum PSALMUS CXXIX, sum kann brúkast til eitthvørt høvi. PSALMUS CXXIX pro choro mixto vel choro puerorum virorumque ella sum hann eitur á føroyskum: sálmur 129 fyri blandað kór ella dreingja- og manskór.

Hesi trý nótaheftini fáast til keyps í bókabúðunum. PSALMUS CXXIX kostar 60 krónur, Orðini 50 krónur og Regn 60 krónur.


*Bjarni Restorff, tónasmiður*